

NÝTT BAND

FINNUR

Ein himmal er

Er at fáa um alt landið

I ♥ TETLEY TEA I ♥ TETLEY TEA I ♥ TETLEY TEA

EIN KOPP AV TE?

Te var longu vanligur drykkur í Kina í 4. øld sum ein heilsuberandi drykkur — Te var drykkur fyri klárari sjón, lættari andadrátti, styrkjan av maganum, ljósari dreymum, bjartari minni, spræknari vøddum, ja enntá drykkur fyri reinskan av sálini.

TETLEY

Tebløðini vaksa á »Camellia Sinesis« runninum, men smakkurin er eftir veðurlagnum og moldini runnurin veksur í. Tey bestu og vælsmakkandi tesløgini eru tey sum vaksa í fjøllunum í svalligum umhvørvi. — Her vaksa tey spakuliga, og geva harvið tann besta smakkin, angan og litin.

TETLEY TE er blandað av **slíkum** tesløgum, fjallavaksið, og er tí mest vælsmakkandi teið á føroyska marknaðinum, tann gylti liturin og fíni angin í **TETLEY TE** kemur eisini til sín rætt í klára føroyska vatninum.

... ja takk, ein kopp av TETLEY TE!

TETLEY TE-kapping

Sendið lokini av TETLEY TEA til

P/f Landshandilin
Box 17
110 Tórshavn

innan **13. des. 86**

og verið við í kappingini um:

1. stk. FUJICA speglrefleksfototól.

1. stk. Hvítur urtagarðsbonkur.

1 testell til 6 persónar.



Leys størv á Fróðskaparsetri Føroya

Treytað av fíggjarlógarjáttan verða tvey størv at seta á Støðisútbúgving 1. mars 1987 ella skjótast gjørligt:

Eitt lektarastarv í ravmagnstøkni og
eitt undirvísingar- og granskingarstarv í teldufrøði.

Tann, ið verður settur í lektarastarvið, skal innan gransking, frálæru og fyrisiting hava tann førleika og tær royndir, ið krevjast til fyrireikingar og uppbygging av tilætlaðum verkfrøðinámi í ravmagnstøkni. Starvinum fylgir eisini frálæra í tøknifrøðiligum grundgreinum og einstøkum sergreinum innan ravmagnstøkni.

Tann, ið verður settur í undirvísingar- og granskingarstarvið, skal taka lut í fyrireikingum og uppbygging av tilætlaðum námi í teldufrøði/hagfrøði. Starvið hevur við sær frálæru í teldufrøðiligu grundgreinunum og einstøkum sergreinum innan teldutøkni.

Meir at vita um nám og starvsskipan fæst við at seta seg í samband við Støðisútbúgving á tlf. nr. 15306.

Løn smb. reglum landsstýrisins um setan av fólki í vísindalig størv við Fróðskaparsetur Føroya.

Møguligt er at endurgjalda flutningsútreiðslur eftir nærri reglum. Um hetta fæst at vita hjá setursskrivstovuni á tlf. nr. 15302.

Umsóknir við øllum upplýsingum av týdningi fyri setan í nevndu størv mugu vera setrinum í hendi í seinasta lagi **2. januar 1987.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Debesartrøð
FR 100 Tórshavn



Lesið um ítrótt í

sosialinum